# Blikka

## Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Eitt stuttligt uttanduraspæl, sum bert tørvar eitt blikk, luttakarar og pláss at spæla.**

Ein luttakari verður valdur út, at vera tann sum telur. Blikkið verður sett á vegin. Tann, sum skal telja, telur t.d. upp í 50, meðan hini krógva seg. Síðan skal hann leita eftir hinum samstundis, sum hann skal verja blikkið. Hvørja ferð hann fær eyga á onkran av hinum, skundar hann sær at traðka á blikkið og rópa: "Blikka og navnið á viðkomandi hann hevur sæð", t.d. "Blikka Anna". Viðkomandi er so funnin og tikin til "fanga".

Tey sum krógva seg skulu royna ikki, at verða funnin, samstundis, sum tey skulu royna at sníkja seg fram til blikkið, uttan at verða sædd, og koppa blikkinum, meðan tey rópa "Blikka". Eydnast tað, so loysir tað øll tey, sum frammanundan eru sædd og tikin til "fanga".

Spælið endar, tá øll eru "fangaði", ella tá onkrum eydnast at koppa blikkinum og rópa "blikka".

Tann sum seinast verður "fangaður", ella tann sum klárar at koppa blikkinum og rópa "blikka, verður síðan tann sum næstu ferð skal telja.



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo